

*Deyðin var vanligur gestur á deildini har Eyðbjørn lá, men Eyðbjørn misti ongantóð mótið.*




*Eyðbjørn vildi staðfesta at hann verðuliga var blivin frískur við at renna eitt maraton.*



MYNDIR: PRIVATAR

var ein ov stórur biti fyri meg, og kláraði eg ikki at standa í meira enn ein hálvan minut í senn. Hetta legði myndamaðurin til merkis og spurdi: »Nú, hvar bleiv hann sjálvur av har afturi?« Tað var heilt einkult ræðuligt. Alt hvítnaði fyri mær á sama hátt, sum tá man starir eftir sólini. Eg royndi at blinka, men tað hjálpti einki. Við hjálp frá tveimum floksfeløgum fekk eg staðið so frætt uppi, at myndirnar vórðu tiknar,« sigur Eyðbjørn.

### Nakrantíð hoyrt um leukemi?

»Sama dag sum eg helt studentarveitsluna, fór eg um kvøldið inn á Landssjúkrahúsið, har eg varð innlagdur. Tað gekk ikki long tíð, til eg fekk at vita, at eg var alvorliga sjúkur. Uttan tað fekk eg ikki serliga nógv at vita. Eg skuldi fáa penicillin hvønn áttanda tíma, so tað var ikki nógv annað at gera hjá mær enn at bíða. Hóast eg fekk hesi boðini, tók eg tað ikki serliga tungt, tí eg dugdi ikki ordiliga at síggja, hvussu eg nakrantíð kundi blíva soleiðis veruliga sjúkur. Næsta dagin frætti eg nærri, at tað var okkurt galið við blóðinum, men eg hugsaði bara, at so mátti tað vera blóðforgifting. Tað gekk tó ikki long tíð, til tey hildu seg hava funnið útav, hvat mær veruliga feilti. Onki ítøkiligt fekk eg at vita, uttan at eg skuldi niður til Danmarkar dagin eftir. Eg valdi at spyrja læknan, hvat mær feilti, og svarið kom sum ein spurningur: »Eyðbjørn, hevur tú nakrantíð hoyrt um leukemi?« Eg hugdi spyrjandi uppá hann, og so fór hann víðari. Hóast eg ikki heilt visti, hvat tað var, so skilti eg, at tað var meira álvarsamt, enn hvat eg av fyrstan tíð trúði«, sigur Eyðbjørn.

> Eg varð innlagdur, og tað gekk ikki lang tíð, til eg fekk at vita, at eg var alvorliga sjúkur

### Akut til Danmarkar

Eyðbjørn varð við tað sama sendur niður á Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn, har hann skuldi kannast enn meira og fáa viðgerð.

»Eg varð sera væl móttikin á Ríkissjúkrahúsinum, og føldi eg meg væl frá fyrsta degi av. Ein ógvuliga fryntlig sjúkrasystir greiddi mær gjøllari frá, hvat leukemi ella blóðkrabbi innibar. Eg havi bara gott at bera Ríkissjúkrahúsinum, og føldi eg veruliga, at eg var í góðum og tryggum hondum. Ein føroyskur kvinniligur lækni hevði nógv við meg at gera, og var hon heilt ótrúliga fyrikomandi og dugnalig. Millum annað at tað vóru so nógv góð og dugnalig starvsfólk rundan um meg, so hevði eg fulla vissu um, at hetta fór at ganga, og at eg innan heilt stutta tíð kundi fortseta mín vanliga dagligdag," sigur Eyðbjørn.

»Støðan var ógvuliga akut, og tí hendi tað ótrúliga nógv, har eg alla tíðina skuldi kannast fyri okkurt. Einar tvær til tríggjar ferðir um dagin skuldi eg taka blóðroynd. Tann eini læknin segði tó við meg, at sanlíkindini fyri, at eg fór at blíva frískur, vóru næstan hundrað prosent, og at eg nokk fór at koma heim eftir trimum mánaðum. Hesi boðini gjørdu meg róligan og tryggan,« sigur Eyðbjørn.

### Fekk deyðadómin

Sjúkan var tó álvarsamari enn fyrst hildið. Nógv álvarsamari.

»Eina viku eftir at eg var komin niður, fór eg undir kemoviðgerð. Læknin forkláraði mær, at man vanliga fyrst skal ígjøgnum tvær viðgerðir. Er krabbin ikki sligin út tá, loysir tað seg neyvan at royna við eini triðu viðgerð. Eftir fyrstu viðgerð burdi krabbin verið minkaður so mikið nógv, at hægst 15% eru eftir. Eftir aðru viðgerð burdi krabbin verið horvin so mikið nógv, at hann ikki kann síggjast í blóð- ella mergroyndum. Um krabbin ikki er horvin eftir aðru viðgerð, so er tíverri einki at gera. Tá er tað einans ein spurningur um tíð, áðrenn tímaglasið rennur út. Læknin sissaði meg tó og segði, at í yvir ▶